# Flogvøllur - droppið alt, uttan Vágar

DÁNJAL POULSEN



**Tosið um nýggjan flogvøll er nú aftur í gongd. Eg havi eygleitt føroysku flogferðsluna nærum dagliga síðan 1962, og haldi at tað er nógv sum írestar í kjakinum**

**Ynskidreymar og heilaspuni**
Sagt verður, at vit eiga at krevja at vit altíð kunnu fara og koma. Hildið verður uppá, at veðrið skal ongantíð órógva flogferðsluna. Summi siga at øll heimsins flogfør skulu altíð kunna lenda í Føroyum.
Vinnulívið ynskir sær ein langan flogvøll sum letur upp fyri stórum farmaflogførum, sum skulu flúgva beinleiðis við fiskum fiski, t.d. úr Føroyum til Tokyo ella Los Angeles.
Ynskiligt hevði verið at havt eina fríhavn, flog og hav, liggjandi beint við flogvøllin, so Føroyar gerast miðdepul í heiminum, altjóða handli viðvíkjandi.
Ynskiligt er at flogvøllur er beint við har man býr. Summi krevja at Føroyar skulu hava tvær floghavnir.
Visiónirnar skulu vera stórar, ongantíð ov stórar, fyri at fáa stór úrslit, varð sagt á flogvallafundinum á Hotel Føroyum herfyri.

**Veruleikin**
Vit eru 48 tús. fólk í hesum landi, og ongi tekin eru um stórvegis fólkavøkstur.
Vit fáa sera fáar turistar til Føroya, og ongi tekin eru um nakran munandi vøkstur.
Tað er als ongin tørvur á, at stór flogfør ferðamannaella farmaflogfør skulu lenda í Føroyum. Ein millumlending oyðileggur tað fíggjarliga roknistykkið fyri tey stóru flogførini.
Laksurin, sum er okkara dýrasta útflutningsvøra, tá vit tosa um størri nøgdir, liggur tíverri niðri á uml. kr. 30,- pr. kilo., og tað er ein "bilig" vøra at flyta við flogfari, einvegis, tí neyvan fáast stórar nøgdir av flogfarmi til Føroya.
Onkur lond fáa "flog-laks" at hanga saman fíggjarliga, men spuringurin er bara um tað loysir seg hjá okkum at brúka fleiri milliardir uppá nýggjan flogvøll, har fiskaflutningur er eitt tungt argument.
Fríhavn, ja - vit hava nú í mong ár roynt at fingið altjóða skip at skrásett seg í okkara FAS, men tað gongur okkum sera smátt við altjóða handli til skip, hóast sagt verður, at vit strategiskt liggja sera væl fyri.
Vit hava ikki so mikið sum funnið útav at stovna tax-free sølu í Floghavnini.
Tað er eisini skilaleyst at tosa um tvær floghavnir í okkara landi. Føroyska altjóða flogferðslan er so lítil, at hon, við "vanligum" avgjøldum, neyvan er før fyri at gjalda raksturin av einari floghavn, tíansheldur tveimum.

**Reglusemi og komfort**
Trupulleikin við verandi flogvølli er ikki størri enn so, at vit hava rímiliga regluligt flogsamband, eini 96 - 97 % varð upplýst.
Loysir tað seg at brúka milliardir, tá óvist er um alt verður nakað betur - ella kanska verri?
Undirritaði hevur flogið nokkso nógv síðan 1970, og havi bert havt tvær seinkingar og havi ikki havt ein einasta "ringan túr" enn - (banka upp undir borðið).

**Kostnaðurin**
Tá ein 400 m. stubbi av flogvølli kostar nærum 400 milliónir kr., so duga øll at rokna út, at ongin komplet floghavn fæst fyri eina ella tvær milliardir kr..
Helst kostar ein liðug floghavn, við allari útgerð, einar 5 milliardir kr.

**Vága Floghavn - besta staðið í landinum**
Verandi flogvøllur liggur á tí allar besta staðnum í Føroyum til flogvøll. Stórur fyrimunur er, at flogbreytin liggur inni í landinum, har vindmegin nærum altíð er einar 10 m/sek. minni, enn úti við havið.
Í sambandi við at lenda, so hava vindvíðurskiftini, ta løtuna tá hjólini skulu niður á asfaltið, næstan alt at týða.
Flogvøllurin í Vágum liggur ikki høgt og landslagið kring breytina er slætt báðumegin við og fyri báðar endarnar hellir landslagið líðandi undan, sum eisini er greiður fyrimunur í sambandi við vind.
Vága floghavn liggur eisini sera væl fyri ferðsluliga í miðstaðarøkinum. Ferðslan úr Norðoyggum og Eysturoy nýtist ikki at koma inn í vánaliga og tilafturs-komna veganetið í Havn og kring Havnina, har ríkiligt av ferðslu er framman undan.

**Glyvursnes**
Tað er ikki neyðugt at taka meira enn eittans argument fram, sum talar ímóti at byggja flogvøll á Glyvursnesi:
Glyvursnes liggur alt ov nær Havnini.
Ongin annar hevði funnið upp á at leggja ein nýggjan flogvøll við flogleið beint yvir miðbýnum, har flogførini lætta sær á bert 2500 m. frá, og fara so brølandi niðan gjøgnum býin.
Ongin ynskir sær óljóðið frá einum flogvølli so nær við bústað sín.
Sagt verður at flogførini kunnu leggja seg á høgru lið og snara, tá tey hava lætt sær á. Hetta hjálpir ikki stórvegis upp á larmin, og tað er avgjørt ikki soleiðis mann planleggur bygging av framtíðar flogvølli í dag.

**Føroyska veðrið**
Gamla orðatakið "veðrið má sær ráða" er enn í gildi. Ongastaðni í verðini kann sigast at veðrið ikki órógvar flogferðsluna, mera ella minni.
Óstøðuga, slavna og baldruta føroyska veðurlagið órógvar í dag og fer framhaldandi at órógva flogferðsluna á okkara leiðum.
Av flogvøllinum verður sagt at reglusemið er uml. 96 - 97 %. Vit kunnu so spyrja okkum sjálv, hvussu stórur er hesin trupuleikin? og ber tað til at hækka reglusemið, og hvat er kostnaðurin?

**Flogskiparin**
Skulu vit koyra, sigla ella flúgva, so er ein góður og lagaligur førari sera avgerðandi fyri trygdina. Arbeiði og avgerðir flogskiparans hava sera stóran týdning fyri, hvussu ferðin hepnast.
Tað er umráðandi at flogskiparin kennir og virðir avmarkingarnar hjá flogfarinum og sær sjálvum.

**Politikkurin**
Søgan sigur okkum hvussu skilaleysur politikkur kann órógva og oyðileggja skilagóðar ætlanir.
Tá Royal Air Force, sum bygdi flogvøllin í Vágum, skuldi handa hann ókeypis til føroyingar í 1945, skrivaði Tórshavnar Kommuna mótmælisskriv til myndugleikarnar. Helst var tað tí at nakað hendið uttan fyri Havnina. Tíbetur varð ikki lurtað eftir mótmælinum hjá havnamonnum, og føroyingar søgdu tá takk fyri gávuna.
Um bretar ikki høvdu bygt flogvøllin í Vágum, so høvdu vit ivaleyst ongan flogvøll havt í Føroyum í dag.
Tá Føroya Løgting, við stórum meiriluta hevði samtykt at Vágatunnilin skuldi byggjast, løgdu politikarar í Havn uppskot fyri tingið, um at støðga hesi góðu ætlan. Tíbetur vann tað ikki frama.
Nú, tá avgerð er tikin um at leingja flogvøllin í Vágum við 400 m., eru somu kreftir í gongd at støðga hesi ætlan, av tí at Glyvursnes í Havn, kanska dragnar nakað afturút. Ongin má lurta eftir hesum skilaleysa mótmæli í dag.
Vit kunnu gloyma alt um Skorðhædd og alt annað. Politikararnir í Havn, sum ivaleyst altíð kunnu útvega sær meiriluta á tingi, hava bara Glyvursnes fyri eyga, sjálvt um teir siga nakað annað.

**Niðurstøða**
Tá flogbreytin í Vágum verður longd (helst til 1800 m.) og best møguligu innflúgvingartól verða sett upp, saman við væl útgjørdum flogførum, við okkara dugnaligu flogskiparum við stýrið, so hava vit eina sera góða framtíðarloysn, eftir okkara umstøðum.
Droppið alt, uttan Vágar.

**Gott Nýggjár og góða flogferð í komandi ári.**

# Thule í føroyskum hami!

ELI HENTZE



Ætli mær at siga sum minst. Havi als ongan áhuga at luttaka í nøkrum skrivligum politiskum orðaskifti við nakran sum helst, men fyri mínar egnu sakir kenni eg meg noyddan at koma við hesum fátæksligu orðum. Havi ilt í sjálvari sálini, føli meg traðkaðan á, háðaðan í mínum elskaði heimlandi av mínum egnu landsmonnum. Háðaður av nógvum, tí eg eri føddur og búsitandi á Sandoynni. Sum sandoyingur havi eg minni virði enn onkur annar í Føroyum!
Undirtónarnir í nógvum skrivaðum og søgdum útsøgnum hesar dagarnar, síðani Sandoyartunnilin varð samtyktur á Føroya Løgtingi av flest øllum løgtingslimunum, ræða meg ikki sørt. Kenni farra av ótti um, hvussu framtíðin verður í okkara landi.
Hesir 1400 Sandoyingarnir hava fingið ein undirsjóvartunnil í jólagávu. Eina ½ millión kr. í part til hvønn sandoying. Í jólagávu! Blaðmaðurin á Sosialinum við síni egnu útlegging av skemti!
Peningur, ið m.a. kundi verið brúktur til bæði børnini hjá stjóranum í Kalli. Eg, sum sandoyingur, eri nú orsøk til, at børnini hjá stjóranum eisini koma upp í liðið av PISA-sibbum.
Løgtingsmaðurin Torbjørn Jacobsen hevur eisini sett róparan fyri munnin. Somu vemmuligu undirtónar. Somu vemmuligu undirtónar, ið allarhelst viðvirkaðu til, at danir í síni tíð fluttu Thulebúgvarnar. Høvdu teir nakað virði, hasir Thulebúgvarnir? Var ikki betri og bíligari at flyta teir? Søguna kenna vit tíverri alt ov væl. Kanska júst tí kenni eg farra av ótta!
Løgtingsmaðurin, ið hevur sum aðalmál at loysa frá Danmark. Harraveldinum, ið kúgar okkum. Harraveldinum, ið ikki virðir okkum sum fólk! Paradoksini undir sólini eru mong. Hesin maður, ið meiri og minni dagliga stríðist fyri at vinna heimsvirðingina, ið loysingin frá Danmark hevur við sær verður sagt, virðir ikki sínar egnu borgarar, niðurger partar av sínum egna fólki, traðkar á tey. Hasir 1400 íbúgvarnir skulu ikki hava undirsjóvartunnil. Búskaparligt vitloysi, sigur hann!
Stóratjørn verður helst veruleikin um ikki alt ov langa tíð. Bíligari er tað væl at flyta okkum øll í íbúðarblokkar upp í í Hoyvíkshaganum. Byggið nóg stórt, so pláss verður fyri suðuroyingunum eisini!
Nei, og aftur nei! Vit sandoyingar hava eins góðan rætt til jólakaramellurnar í hesum landi. Fólki her býr er tilfangi, sum ikki kann gerast upp í pengum. Sum ikki skal gerast upp í pengum. Hvør einasti sandoyingur, føroyingur eins og øll onnur menniskju á jørðini eru virðismikil, unikk. At stjórin í Kall og løgtingsmaðurin Torbjørn Jacobsen hava eina aðra meining má so standa fyri teirra rokning.

# Hví fokusera uppá langan flogvøll

FRANK DAVIDSEN



Hvat er orsøkin til at tað er so umráðandi neyðugt at gera ein flogvøll, ið skal vera 2500-2700 m. langur.
Í løtuni meta vit verandi flogvøll at vera okkara motorvegur inn á meginlandið. Vit hava fleiri túrar um dagin, ið hevur við sær, at tú kann fara tíðliga á morgni, gera tíni ørindi ella arbeiði og koma heimaftur um kvøldið.
Um vit hinvegin fara út á 2500 m. fyri at fáa nógv størri flogfør at røkja Føroyarutuna, so slepst ikki undan at okkara sokallaði »motorvegur« fær ein nógv minni og meiri negativan týdning.
Fyrst og fremst tí at túratalið fer kanska niður í helvt ella meira, tí vit skulu ikki billa okkum inn, at hesi nýggju flogfør - har kanska eitt av teimum kostar líka nógv sum øll Atlantic flogførini tilsamans, fara at flúgva hálvfermd.
Harnæst er als einki í øllum tosinum um at útflyta stórar nøgdir av fiskavørum, tí sjálvt tá ið bæði Maersk-air og Atlantic flugu og tað var pláss fyri fleir tonsum um dagin, so var áhugin at flyta út fisk lítil og eingin.
Tí kann ein spyrja seg sjálvan, um tað ikki er mjørkatos, tá vit tosa um ein altjóða flogvøll, vit hava jú ein altjóða flogvøll sum er og tá ið »flogvallarserfrøðingar« við Poul Michelsen á odda krevja, at vit mega hava ein flogvøll í kategori 2 ella 3, so kann ein spyrja, um maðurin veit hvat krevst fyri tílíkum standardi í okkara pinkulítla oyggjalandi.
Nú tað er koyrandi frá Gásadali til Viðareiðis og við fleiri milliardum í íløgum hesum viðvíkjandi, so tykist tað løgið, at nú hava føroyingar knappliga ikki stundir, nei tað er alt ov leingi at koyra 45 min. til flogvøllin, nei, nei, nú skal tað helst niður á 25 min. Álvaratos, eru vit ikki við at seta heimsmet í grenjimentaliteti, tað næsta verður helst, at vit skulu hava einar 15-20 tyrlur at flúgva ferðafólk aftur og fram til flogfarið.